## Sendifólk – og kvinna

Fyrilestur við Gunvør Balle í Mettustovu 4. februar kl. 20:00. Gunvør er 40 ár og útbúgvin cand. merc. Í september 2007 flutti hon til Íslands við manni og 3 børnum. Endamálið við flytingini var, at hon skuldi seta á stovn eina føroyska sendistovu í Reykjavík.Mánakvøldið 4. februar fer hon at greiða frá sínum arbeiði sum føroysk sendikvinna í øðrum landi. Hvat hennara fyrstu uppgávur hava verið, og hvørjar avbjóðingar eru fyri framman. Eisini fer hon at umrøða hvussu tað er at vera kvinna í slíkum starvið – munin á samfelagnum í Føroyum og Íslandi, ávirkanina á familjuna, og tað at arbeiða í tíðaravmarkaðum starvi.



## Kveistra Norðlýsið burtur

Norðlýsið nevndi herfyri at tað var úr Fíggjarmálaráðnum, at skuldsetingar móti Høgna Hoydal, løgtingsmanni komu. Ráðið hevur nú, innan galdandi kt-trygdarpolitikk, kannað hetta málið og niðurstøðan er, at tað ikki er grundarlag at fara víðari við málinum. Tær upplýsingar, sum Norðlýsið hevur lagt fyri Fíggjarmálaráðið, eru av einum slíkum slagi, at tær tøkniliga kunnu verða skrivaðar av einum og hvørjum. Ráðið harmast, at Norðlýsið á slíkum óvissum grundarlagi hevur reist illgruna til øll starvsfólk í Fíggjarmálaráðnum. Talan er um umleið 220 fólk, ið hava verið rakt av hesum skuldsetingum.

# dsstýrið

**Viðmerkjast skal, at hesar greinar eru skrivaðar, áðrenn samráðingarnar um nýggja samgongu eru lidnar. Tískil er ikki greitt, um tað eydnast hesum flokkum at finna fram til eina samgongu**



*Olga Biskupstø*



*Jóannes Eidesgaard*



*Høni Hoydal*



*Bjørt Samuelsen*



*Thorbjørn Jacobsen*



*Karsten Hansen*



*Helena Dam á Neystabø*



*Hans Pauli Strøm*

# Bíða á trappuni

**Nýggja samgongan ber við sær, at fleiri koma á ting, sum valdagin ikki rukku upp um tinggáttina**

NÝGGJ Í TINGINUM

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá ið samgongan verður skipað millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin, og tá ið landsstýrið verður mannað, so fara fleiri at fáa kjans í Løgtinginum, sum á sjálvum valdegnum vóru júst ov stutt at vinna sær tingsess. Hetta veldst so alt um, at tað verður henda samgongan. Í skrivandi løtu er tað ikki greitt.

Um Tjóðveldi fær fýra landsstýrissessir, og um Høgni Hoydal, Bjørt Samuelsen, Tórbjørn Jacobsen og Olga Biskipstø fara í landsstýrið, so fara trý, ið ikki vórðu vald 19. januar, at vera við til at manna tingbólkin hjá Tjóðveldinum.

Felags fyri øll trý er, at tey vóru í tinginum fram til løgtingsvalið, og at tey bjóðaðu seg fram av nýggjum uttan at verða vald.

Talan er um Páll á Reynatúgvu, Heidi Petersen og Finn Helmsdal.

Um Javnaðarflokkurin fær løgmann og tveir landsstýrismenn, og um Jóannes Eidesgaard, Hans Pauli Strøm og Helena Dam á Neystabø fara at manna landsstýrissessirnar, so verða trý, ið valdagin ikki vórðu vald, í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum.

Talan er um Andreas Petersen, Eyðgunn Samuelsen og Mikkjal Sørensen. Andreas var løgtingsmaður inntil á valinum 19. januar, og Mikkjal Sørensen hevur áður fleiri ferðir verið í tinginum sum varamaður. Eyðgunn Samuelsen hevur onkra ferðina verið varamaður fyri Vilhelm Johannesen.

Um Karsten Hansen verður landsstýrismaður fyri Miðflokkin, so verður Tordur Niclasen tingmaður fyri Miðflokkin. Tordur hevur verið tingmaður fyri Kristiliga Fólkaflokkin og Miðflokkin.



*Eyðgunn Samuelsen*



*Andreas Petersen*



*Finnur Helmsdal*



*Tordur Niclasen*



*Heidi Petersen*



*Mikkjal Sørensen*



*Páll á Reynatúgvu*